# Brúðarmyndir



*Hin 6. aug. 2005 vóru vit hjúnavígd í Sjóvar kirkju. Ein vakur og ríkur dagur. Vit takka hjartaliga fyri fjarrit, gávur og heilsanir. Takk fyri løtuna í kirkjuni og veitsluna í bygdahúsinum í Leirvík.*
***Anna og Jimmy***



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera silvurbrúdleyp okkara 28. okt. 2005 so ótrúliga gott og minnisríkt.*
***Heilsan***
***Betty og Noel Joensen***


STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur/Byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi ella líknandi til framleiðsludeildina hjá Landsverki. Framleiðsludeildin hevur skerv- og asfaltverkini, maskinamboðini og tyrlupallarnar um hendi. Nýggi verkfrøðingurin fer at hava mest við skerv- og asfaltverkini at gera. Asfaltframleiðslan fer fram á verkinum í Hundsarabotni.

Royndarstova er knýtt til verkið. Bitumengoymsla er í Hósvík við blandiverki. Tilsamans eru 4 skervverk kring landið: Hundsarabotni, Lambareiði, Porkeri og Sandi. Árliga verða 30-40 km av landsvegi asfalteraðir, eins og asfalterað verður fyri kommunur og privat.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar eru planlegging o.a. í sambandi við framleiðslu og útlegging av asfalti og góðskustýring innan virksemið hjá deildini. Tann, ið settur verður, kann eisini rokna við at koma at arbeiða við øðrum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi ella líknandi við hollari ástøðiligari útbúgving og við góðum kunnleika til edv. Kunnleiki til ella royndir við asfaltframleiðslu er ikki nakað krav, men gevur tó fyrimunir. Rætta fólkið við áhuga fyri at seta seg inn í nevnda virkisøkið fær møguleikan at menna seg innan hetta økið við relevantari upplæring.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum verða at senda til:

Landsverk
Postboks 78,
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 3. mars 2006. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðari, á tlf. 340 800 ella 540 843. E-postur: torols@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



## STARVSFÓLK SØKIST

Starvið umfatar sølu av el-lutum.

Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og/ella tænastu. Dentur verður lagdur á at tú dugir væl at samskifta, er skyldsøkin og fyrikomandi.

Umsókn verður at senda til:

solar FØROYAR

Brekkutún 2 · Hoyvík · Postsmoga 105 · Att.: Finn Jørgensen
Tel 35 79 33 · solar@solar.fo



HUXA

BORGARLIGT BORÐHALD

**Ársveitsla og aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi**

**Aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi, verður fríggjakvøldið 24. februar 2006 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.**

**Skrá sambært viðtøkum felagsins**

**Eftir fundin verður veitsla við døgurða, undirhaldi og tónleiki afturvið.**

**Kostnaður fyri veitsluna er kr. 100,-**

**Nýggjir limir kunnu tekna seg á tlf. 212491 ella 256762. Eisini ber til at tekna seg til huxa@huxa.fo**

**Allur HuXandi ungdómur er vælkomin!**